# Eyðmerking av AGD

AGD (Amoebic Gill Disease) eru amøbur (skaploysingar), ið festa seg á táknur, og harvið minka um iltupptøkuna hjá smittaða fiskinum. Hvussu illa fongdar táknurnar á fiskinum eru, kann býtast upp í seks stig (0-5). Har táknur uttan sjónlig tekin um amøbur fáa metingina **stig 0**. **Stig 1** táknur sýna fyrstu tekin um smittuna. Á **stig 2** táknum hava amøburnar veruliga fest seg, og økini eru vorðin størri og fleiri. Á **stig 3** táknum byrja amøburnar at spjaða seg tvørtur um allan táknubogan. Á **stig 4** táknum hava amøburnar spjatt seg um allan táknubogan, og fjala upp til 50% av táknunum. **Stig 5** táknur eru mestsum undir í amøbum. Vanligt er, at fyrstu teknini uppá AGD (stig 1 og 2) eru at finna nær við táknubogafestið. Týdningarmikið er tí at kanna hesi økir væl. Hóast hetta kunnu tað vera aðrir táknubogar, ið fyrst verða verri fongdir (stig 3-5). Hvussu illa fongdar táknurnar eru, verður mett út frá ringast fongda táknuboganum. Reytt doyvingarvatn (blóð), kann vera ábending um AGD.

Stig 1



Stig 2



Stig 3



Stig 4



Stig 5

